# Statoil "visti" hvar oljan var

**Tá umboð fyri Statoil lótu inn umsóknina til 1. útbjóðing á landgrunninum varð ynskiteigurin júst tann sami, sum Amerada Hess seinni fekk og fann olju í. Tað áhugaverda er tó, at meðan serfrøðingarnir hjá Hess ikki høvdu roknað við at finna olju og gass so djúpt niðri í undirgrundini, so høvdu jarøðingarnir hjá Statoil nettupp peikað á møguleikan at finna olju á hesum staðnum og dýpinum.**

OLJULEITING OG EFTIRMETING
*Jan Müller*

Teir vóru bæði fegnir og vónsviknir – serfrøðingarnir hjá Statoil, tá Amerada Hess fyri nøkrum vikum síðani sum fyrsta oljufelagið á føroyska landgrunninum rakti við týðandi nøgdir av olju og gassi á stórum dýpi.

Fegnir - tí fundið hjá Hess var nettup tað málið, sum jarðfrøðingarnir hjá Statoil og hinum feløgunum í samtakinum, peikaðu út sum mest áhugaverda økið, tá umsóknin at leita eftir olju á landgrunninum varð latin inn. "Upsin" kallaðu teir prospektið, sum teir mettu kundi goyma olju og gass.

Vónsviknir - tí eitt annað oljusamtak fann oljuna teir upprunaliga sjálvir høvdu ætlað sær at fara eftir.

Sosialurin hevur fingið uppspurt frá vælvitandi keldum, at Statoil-serfrøðingarnir vóru so mikið avgjørdir og neyvir í sínum metingum av økinum, har Amerada Hess seinni skuldi raka við olju, at teir í síni umsókn nettupp høvdu víst á møguleikan at finna olju og gass á umleið 4300 metra dýpi. Tað skilst, at júst hesin teigurin og eisini boristaðið tætt uppat markinum var 1. prioritetur hjá Statoil, men tað varð so Amerada Hess, sum fór við hesum teiginum. Hetta varð eisini eitt enn betri "skot" enn tað hjá Amerada Hess. Tí endaliga málið hjá Hess var niðri á umleið 3800 metrum ella nakrar hundrað metrar ov stutt. Men Hess tevjaði gass á hesum dýpinum og metti, at okkurt meira mátti verða longur niðri. Og so varð. Amerada Hess, Dong og Atlants Kolvetni tóku av sínum eintingum, uttan at hetta varð nakað krav frá Oljumálastýrinum, á seg at bora longur niður.

Við øðrum orðum vóru tað serfrøðingarnir hjá Statoil, sum longu á tekniborðinum "sóu" olju- og gassfeltið, ið Amerada Hess lutvíst av tilvild men eisini av treiskni at váða nakað meira kom niður á. Blaðið skilur, at Statoil hevði givið hesum økinum navnið "Upsin", nú tað lá so djúpt. Veruleikin gjørdist so ein annar og mátti Statoil í útbjóðingini taka til takkar við "Longuni", sum vísti seg at vera ein meira ella minni turrur brunnur. Hvussu og ikki so kunnu serfrøðingarnir hjá Statoil, sum sóu Upsan sum besta prospektið á føroyska økinum, fegnast um, at teirra útrokningar og metingar vóru rættar, og teir kunnu somuleiðis fegnast um, at treisknið hjá Amerada Hess hevur sett alt Føroyaøkið í eitt meira positivt ljós.

Tað er ógjørligt at fáa nakra viðmerking hvørki frá Oljumálastýrinum ella Statoil til hesi tíðindini. Men keldur okkara eru góðar nokk. Stóra "slagið" um fyrstu oljuna stóð tí longu í metingunum av umsóknunum í fyrstu útbjóðing. Flestu feløgini peikaðu á teigin, ið Amerada Hess fekk sum tað mest lovandi økið. Blaðið skilur eisini, at munurin millum umsóknirnar hjá Amerada Hess og Statoil samtøkunum var kanska ikki so stórur. Tað var eftir øllum at døma ein torfør avgerð hjá føroysku oljumyndugleikunum at gera av, hvør skuldi fáa gimsteinin "Gullhornakrúnuni". Eisini feløg sum Texaco, Agip, Hydro og Saga vóru úti eftir hesum eina gullrandaða teiginum. Men tað eydnaðist so The Faroes Partnership at fáa loyvið, tí tað eftir øllum at døma hevði bestu umsóknina.



*Umboðini fyri Statoil-samtakið á veg í Oljumálastýrið við umsókn síni at sleppa at bora upsan – nettupp á sama stað, har Hess lutvíst av tilvild fann olju og gass*

*Mynd Jan Müller*



*Teir bora á Sovereign Explorer. Borimóðran sprænir upp úr holinum*

*Mynd Statoil*

## Propp í Svínoyarbrunnin

RIGGA AV OLJULEITING
*Jan Müller*

Sunnudagin kemur stóra boriskipið West Navion aftur í føroyskan sjógv. Hesaferð ikki fyri at leita eftir olju og gassi, men fyri at seta propp í Svínoyarbrunnin, sum BP og Shell boraðu herfyri uttan nevnivert úrslit. Talan er um at taka sjálvt borihøvdið upp av havbotninum og síðani seta endaliga proppin í holið. Sjálvt holið er longu fylt við sementi, soleiðis at brunnurin ikki verður brúktur aftur.

West Navion hevur í eina tíð borað ein brunn fyri BP og Shell á bretskum øki. Vónirnar til at finna olju í hesum brunninum, Assynt vórðu nógv størri enn í Svínoyarøkinum. Men eftir tí sum Sosialurin skilur, so er eisini hesin brunnurin turrur. Hetta er eitt stórt vónsvik fyri BP, tí felagið hevði gjørt seg út til at fara undir framleiðlsu frá fundum á føroyskum og bretskum øki, um so var at olja varð funnin. BP og Shell hava annars bundið seg til at bora 2 ella 3 brunnar aftrat í hesum loyvinum 204/18, sum liggur uppat føroyska markinum. Óvist er nær teir verða boraðir. Helst verður tað ikki fyrr enn í 2003, tá BP og Shell helst eisini fara at bora á føroyskum øki.

Annars verður roknað við nógvum borivirksemi bretskum megin markið næsta ár. Amerada Hess fer helst at bora ein brunn í sínum loyvi beint hinumegin markið, og verður hesin brunnurin eisini at meta sum ein metingar- og avmarkingarbrunnur fyri tað fundið, sum felaigð hevur gjørt á føroyska landgrunninum. Helst er talan um eitt oljufelt, sum liggur báðumegin markið. Phillips hevur eitt loyvi á bretskum øki við síðuna av tí hjá Amerada Hess og bendir okkurt á, at teir fara eisini at bora har næsta ár. Satoil er við í tí loyvinum. Síðani kemur Texaco ella sum tað nú eitur ChevronTexaco, sum hevur fleiri loyvi í bretska partinum av fyrrverandi Hvíta økinum. Tað ljóðar at ChevronTexaco fer at bora ein brunn í loyvinum, sum liggur beint hinumegin loyvið hjá Agip og Føroya Kolvetni á landgrunninum. Sosialurin hevur skilt, at metingarnar vísa, at eitt møguligt oljufelt á bretska økinum gongur um markið og inn á loyvið hjá Agip. Í hesum sambandi hava verið nógvar gitingar, um ikki Texaco, sum hevur havt stóran áhuga í føroyska økinum, ikki hevði eitt ynski um at sleppa við í samtakið hjá Agip og Føroya Kolvetni. Hetta vildi verið rættiliga náttúrligt, ikki minst um so er, at ein møguligt oljufelt liggur báðumegin markið. Tá fara vit at uppliva tað sama sum nú verður gitt um í loyvunum hjá Ther Faroes Partnership báðumegin markið.

Sosialurin veit frá keldum, at fleiri feløg "fríggja" til Agip um at sleppa uppí loyvið á landgrunninum. Í oljuverðini hevur tað eisini verið mett rættiliga náttúrligt, at okkurt felag kom uppí loyvi aftrat fyri harvið at minka um váðan hjá Agip. ChevronTexaco skal so vera eitt av teimum feløgunum, sum liggja framvið. Men okkurt annað er eisini.

Alt hetta bendir á, at vit fara at fáa nógv borivirksemi beint við markið inni á bretskum øki næsta ár. Og at hetta virksemið eftir øllum at døma er tætt tengt at møguleikanum fyri at finna olju á okkara egna landgrunni.



# Hava gjørt jólapynt í fimm mánaðir

**Leygardagin hevur Verkstaðið á Brekku í Klaksvík jólasølu. Ein ørgrynna av vøkrum og litføgrum jólapynti er til sølu**

JÓL
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Tá fólkini, sum ganga á Verkstaðnum á Brekku, komu úr summarferiu, fóru tey undir at gera jólapynt, hóast summarið framvegis ikki var liðugt.

Hetta var í august mánaði, og síðani er meginparturin av tíðini farin til at gera jólapynt.

Og tað er ber skjótt til at staðfesta, at tey hava verið íðin. Fríggjamorgunin, tá vit vitjaðu inni á gólvinum, gjørdu tey klárt til árligu jólasøluna, sum tey fara at hava leygardagin.

Ein ørgrynna av litføgrum og fjølbroyttum jólapynti var sett fram, og í dag fáa fólk møguleikan at ogna sær okkurt av hesum.

Jólasølan í Verkstaðnum á Brekku er opin leygardagin frá klokkan 16.00 til 20.00. Umframt sjálva søluna hava tey eisini café.

### Upplivingar og lærdómur

20 fólk ganga í Verkstaðnum á Brekku, og talan er bæði um menningartarnað og fólk, sum hava okkurt kropligt brek. Fýra fulltíðarstørv eru har.

– Verkstaðið snýr seg ikki bara um at framleiða nakað. Tað snýr seg eisini um, at fólkini skulu hava upplivingar, og at tey læra nakað nýtt, sigur Jóna Olsen, sum er leiðari á verkstaðnum.

Umframt nógva jólapyntið gera tey eisini ymiskt annað á verkstaðnum, og gjøgnum árini eru nógvir plattar smíðaðir á Brekku.

– Høvuðsframleiðslan hjá okkum er jólapyntið, og tað brúka vit nógv tíð til.



*Maria ger klárt til jólasøluna*



*Ingibritt, Jacobina og Jóngerð við nøkrum av lutunum, sum verða til sølu leygardagin*

## Tendra jólatræið í Klaksvík

**Klaksvík:** Leygardagin verður jólatræið í Klaksvík tendrað, og tá fer Skótalið Nólsoyar Páls at skipa fyri hátíðarhaldi í Vágstúni.

Klaksvíkar Hornorkestur fer at spæla, og eitt barnakór fer at syngja.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, fer at flyta fram røðu, og tað er fyrstu ferð, at hann ger tað til jólahald í Klaksvík.

Tiltakið verður leygardagin kl. 17.00.

**ek**

# Jógvan blæsur andaligar tónar

**Jógvan Zachariasen gav í gjár út nýggja fløgu, har hann saman við øðrum spælir sálmar og sangir**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tónleikarin Jógvan Zachariasen lat í gjár nýggja fløgu úr hondum. Hetta er fløga, hann rópar »Faith« – trúgv – og fagottin hjá Jógvani er høvuðsljóðførið á fløguni.

Talan er um eina instrumentala fløgu, har Jógvan spælir sálmar og sangir. Talan er um sangir sum »Bert ein dag«, »Nærri mín Gud til tín«, »Hon er frí« og »Krossurin«. Fleiri aðrir sangir eru eisini á fløguni, og millum teirra er eisini ein Kingo sálmur, sum Jógvan spælir á ljóðføri sítt.

Jógvan gav eina líknandi fløgu út í 1997, og tað var fyrsta fløgan í Føroyum við fagottspæli.




*Jógvan Zachariasen hevur givið nýggja fløgu út, har hann spælir sálmar og sangir á fagott*

### Samanspæl

Stílurin á nýggju fløguni er líkur fyrru fløguni, men tann nýggja fløgan ljóðar øðrvísi, og samanspælið við onnur ljóðføri er øðrvísi og meira eyðsýnt.

Nakrir av fremstu tónleikarunum í landinum spæla saman við Jógvani. Regin Guttesen spælir ljómborð, Jákup Zachariasen gittar, Jan Zachariasen bass og Óli Poulsen slagtoy.

Óli Poulsen hevur eisini ljóðblandað tónleikin á fløguni.

